# Máltíð á 10.000 metra hædd

**Fasten your seatbelt – get ready for takeoff – crosscheck please!**
**Tá hesi orð eru søgd, vita tey flestu, hvat tað næsta er á skránni umborð - flogmaturin.**
**Vit hava kannað eftir, hvat hendir áðrenn flogmaturin endar framman fyri tær umborð á flogfarinum**

FLÚGVING
*Inna Tørnroos*
*inna@sosialurin.fo*


*Roastbúffur og rækjur eru á matskránni hesa vikuna.*

Inni á Hotel Vágum er klokkan akkurát farin av átta, og sjey kvinnur standa í rúkandi farti og gera smyrjibreyð. Breyðini skulu smyrjast, salatbløð, roastbúffur, leykur, remoulada og tomat skulu leggjast á, og alt skal helst síggja vakurt og leskiligt út.

Í einum øðrum rúmi verður eitt annað slag av mati gjørdur, sum er til teir styttri flogtúrarna. Tvíflís við ost, skinku og salat verður lagt í posar, sum skulu til Stanstead.

Hendan morgun skulu kokkarnir á Hotel Vágum gera 450 »matar«, sum tær kalla tað. Og alt skal vera úti av húsinum áðrenn klokkan 10 um morgunin.

– Vit hava ongantíð verið ov seinar enn, siga tær. Maturin ídag er roastbúffur og rækjur á smyrjibreyði. Aðrar daga kann tað verða laksur, kjøtfrikadellur, rullipylsa og fiskaflak.

– Vit hava 16 ymiskar matskráir, sum vit skifta ímillum. Vit gera sama mat í eina viku, sigur Malja Danielsen, kokkur á Hotel Vágum. Í dag er nógv at gera, so eyka fólk eru innkallað.

Viðhvørt hyggja tær til ein lepan, ið hongur uppi á vegginum. Har hevur Atlantsflog skrivað nøvnini á teimum ymisku flogførunum, nær tey skulu avstað, og hvussu nógv fólk eru í hvørjum. Í dag eru nýggju flogfør, sum skulu avstað úr Vágum.

15 av teimum 450 fólkunum eru børn, og tey skulu hava sín serliga mat, ið er eitt sindur lættari enn hjá teimum vaksnu. Tvíflísar, eitt petti av eini appelsin og ein sleikisneis verður pakkað til børnini. Onkutíð fáa tey sjokalátapálegg.

## Kaldan mat

Matskráin verður gjørd í samráð við Atlantic Airways, og roynt verður at passa matin til sesongina. Atlantsflog hevur alt frá byrjanini bjóðað kaldan mat – Maersk Air hevði heitan mat og nýggja flogfelagið FaroeJet skal eisini hava heitan mat til síni ferðafólk.

– Tað er faktiskt lættari at gera heitan mat. Tann kaldi maturin er nógso nógv arbeiði við eftirsum so nógv ymiskt skal leggjast á breyðini, sigur Amy Jacobsen, kokkur á Hotel Vágum.

Nógv arbeiði við at pakka bestikk og seta koppar og pappír á bakkarnir verður gjørt frammanundan. Eisini verður citrón, tomat og annað skorið upp dagin áðrenn.

Viðhvørt verður serligur matur gjørdur tá vegetarar, diabetiarir ella fólk við ovurviðkvæmi eru umborð.

– Atlantsflog boðar okkum frá, um tað er nakað serligt, sigur Kári Hentze, stjóri á Hotel Vágum. Viðhvørt verða lítlar lagkøkur eisini gjørdar til tey, sum hava føðingardag ella eru nýgift.


*Børnini fáa sleikisneis*


*Matpakkarnir verða gjørdir í tí rúkandi farti.*

Kári Hentze meinar, at matur má verða umborð á flogførunum úr Føroyum.

– Fólk lata seg pent í, tá tey fara út at flúgva her og vænta sær at fáa mat, tá tey koma umborð.

Annars eru tað nógv flogfeløg uttanlands, sum velja at ikki servera nakran mat ókeypis, men lata ferðafólkini keypa tann mat, tey vilja hava.

Hotel Vágar fær sjáldan nakrar klagur um matin umborð, onkutíð hevur onkur sagt, at víndrúvurnar vóru modnar.

Ein flogterna, vit hava tosað við, sigur at maturin, teim flestu dáma best er rullupylsa og fiskaflak. Tá eru ongar leivdir eftir á bakkunum.

Tá klokkan er blivin 9.30 verða lokini koyrd á smyrjibreyðspakkarnir og verða teir settir inn í vognarnar. Ein maður kemur og koyrir teir oman til flogførini, og so er bara hjá flogternunum at servera umborð. Góðan matarlyst!

## Flogmatur á alnótini

**Heimasíður verða gjørdar um tey mest løgnu evni. Ein heimasíða er bara um flúgvimat. Ferðafólk úr øllum heiminum hava sent myndir inn og skrivað, hvussu teimum dámdu matin. Og jú, Atlantic er eisini við.**

FLÚGVING
*Inna Tørnroos*
*inna@sosialurin.fo*

Í løtuni eru 16.769 myndir inni á www.airlinemeals.net, og talið økist alla tíðina. Flogfeløg sum Xiamen Airlines, Kulula, SAS, American Airlines, Druk Air og okkara egna Atlantsflog eru nøkur av teimum 521 flogfeløgunum, sum eru umboðað á heimasíðuni.

Litmyndir eru av mati og drykkivørum, ið verða bodnar umborð. Eisini verður skrivað, hvar flogið var ímillum, hvussu nógv ferðaseðilin kostaði, hvussu leingi ferðin vardi, og so verður ummæli frá 1 til 10 sett á, hvussu maturin og tænastustøðið var umborð.

Summi flogfeløg hava nógv ymisk fólk sent myndir og ummæli inn um, og onnur er tað bara ein persónur, sum hevur skrivað um. Flogfeløg sum ikki hava so gott orð á sær, sum til dømis Aeroflot, hava ikki so vánaligan mat, sum ein hevði trúð, nógv hava givið teimum bæði 7, 8 og 9 í karakteri.

Flogfeløgini vit kenna best her í Føroyum Maersk Air og Iceland Air fáa blandað ummæli. Ein skrivar, at lasagnan hjá Iceland Air var »vemmilig« og ræður øllum, sum skulu flúgva við Iceland Air at eta áðrenn tey fara umborð. Maersk Air fær hampulig umdømi, onkur heldur, at tað var í so lítið av mati.

Atlantic Airways hevur bara eitt ummæli á síðuni. Men tað er ein sera vælnøgdur maður. Hann skrivar »øgiliga høgt tænastustøði, nógv betri enn onnur flogfeløg sum flúgva so stuttar túrar«. Hann gav Atlantsflog 8 í karakteri.


*Atlantsflog fekk høgan karakter*


*Concorde hevði høgt støði á matinum*


*Maturin hjá pólska felagnum LOT luktaði illa*


*»Vemmilig« var lasagnan hjá Iceland Air*



Møttøka hjá Kaupthing
Fríggjadagin 7. apríl klokkan 15.00 – 17.00

Kaupthing er flutt í nýggj høli í Bókbindaragøtu 8, og tí vilja vit fegin bjóða øllum viðskiftafólkum, vinum og áhugaðum annars til almenna móttøku.

Á móttøkuni verður ábit og undirhald, og harafturat fer Kaupthing at nýta høvið til at handa eina munagóða peningagávu til eitt vælgerandi endamál.

Tel 35 15 00 · Fax 35 15 01 · www.kaupthing.fo
KAUPTHING